## Norskt silvur í kappgongd

Kjersti Tysse Platzer syrgdi fyri sættu norsku OL-medaljuni, tá hon sum næsta kvinnan gekk um málið í 20 km kappgongd. Hetta gjørdi hon í tíðini, 1.27,07, og er hetta nýtt norskt met. Russiska Olga Kaniskina vann gull, meðan italska Elisa Rigaudo vann silvur. Silvurið lyftur Noreg upp á eitt pláss sum nummar 30 á listanum yvir mest vinnandi tjóðirnar í aktuellu OL-útgávuni. Har er Danmark enn besta norðurlandi.



## Forsetin illur um Dunga

Brasil hevur havt eitt vánaligt OL higartil. Ikki minst hevur tað skapt ónøgd, at landið tapti hálvfinaluna í olympisku fótbóltskappingini móti Argentina. Og nú hevur forsetin í landinum, Luiz Inacio Lula da Silva, fingið nokk. Hann sigur nevnliga, at Dunga ikki hevur skil fyri at gagnnýta talentið í brasilskum fótbólti, og at hann tí skal koyrast úr starvinum. Dunga er ein tann mest vinnandi brasilski spælarin nakrantíð, men dygdir hansara vóru tó ikki tær typisku samba-rútmurnar, sum Brasil annars er kent fyri.



*Leif Niclasen var ein av trimum EB/Streyma-spælarum, sum spældi sín fyrsta A-landsdyst í gjárkvøldið*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Innrás úr oddaliðnum

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð vóru fimm spælarar úr EB/Streymi á landsliðnum, tá ið fimm umboðaðu føðilandið fyri fyrstu ferð**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var dagurin hjá EB/Streymi á landsliðnum í gjár. Eitt tað nýggjasta felagið í fremstu fótbóltsrøðini eigur ikki so nógvuliga nógvar spælarar, sum hava verið á landsliðnum, og felagið eigur ongan spælara, sum hevur spælt nógvar ferðir á landsliðnum.

Niðri í Portugal vóru fimm frá steypavinnarunum og toppliðnum í landskappingini á landsliðnum. Mikkjal Thomassen og Bárður Olsen hava áður roynt seg sum landsliðsspælarar. Teir, sum ongantíð áður høvdu verið á landsliðnum, og sum vóru við í 5-0 tapinum, eru málverjin René Tórgarð, miðverjin Egil á Bø og vongverjin í vinstru Leif Niclasen.

René Tórgarð hevur leingi sitið á beinkinum og bíðað eftir at fáa møguleikan. Hann er sætti málverjin á landsliðnum, síðani altjóða limaskapurin gjørdist veruleiki fyri 20 árum síðani. Hinir eru Jens Martin Knudsen og Jákup Mikkelsen, sum hava vart málið nógv tær flestu ferðirnar, og Kaj Leo Johannesen, Bjarni Johansen og Sunvard Joensen. Hesir báðir seinast nevndu spældu ávikavíst tvær ferðir og eina ferð á landsliðnum.

Umframt teir tríggjar úr EB/Streymi, sum í gjár vóru fyrstu ferð á landsliðnum, vóru tveir aðrir á landsliðnum fyri fyrstu ferð. Talan var um miðvallaran Boga Løkin úr NSÍ og um álopsspælaran Andreas Lava Olsen úr Víkingi.

Ein annar spælari hevur higartil í ár verið á landsliðnum fyri fyrstu ferð. Tað er Høgni Madsen úr ÍF, sum spældi fyrsta landsdystin, tá ið Føroyar 4. juni taptu 4-3 á útivølli ímóti Estlandi. Høgni varð aftur í gjárkvøldið skiftur inn á føroyska miðvøllin.

# Portugal hevur ofta vunnið stórt

**Men ímóti Liktinstein í síðstu HM undankapping megnaði Portugal ikki meiri enn javnleik á útivølli og tepran sigur á heimavølli**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eingin ivi er um tað, at í gjárkvøldið hitti føroyska landsliðið eitt av heimsins bestu landsliðum. Vit kenna spælararnar frá nøkrum av bestu feløgunum í heiminum – eitt nú Manchester United og Chelsea – og vit síggja tað á styrkislistanum hjá FIFA, har Portugal er ímillum tey bestu, meðan Føroyar eru á plássunum millum 190 og 200.

Tølini siga eisini, at Portugal, sum fyri tveimum árum síðani var í hálvfinaluni, tá ið HM endaspælið var í Týsklandi, ofta hevur vunnið sannførandi sigrar. Ikki bara ímóti smáum fótbóltstjóðum, men eisini viðhvørt ímóti teimum stóru.

Síðsta dømi um, at Portugal hevur vundið burturúr einari av stóru fótbóltstjóðunum var tað, tá ið Portugal á heimavølli í HM undankappingardysti í 2004 vann ikki minni enn 7-1! á Russlandi.

Tað eru fleiri dømi um, at Portugal hevur vunnið stórar sigrar ímóti smáum fótbóltstjóðum. Størsti sigurin, sum Portugal hevur vunnið í nýggjari tíð, var, tá Kuwait í vinardysti í 2003 legði rygg til 8-0 tap.

Í undankappingardystum ímóti Luksemburg í 2004 og 2005 var eisini talan um stórtøl. Portugal vann ávikavíst 5-0 og 6-0.

Tað er tó ikki altíð, at tað hevur hilnast so ógvuliga væl. Okkurt dømi er um, at Portugal hevur verið kroyst ímóti fótbóltstjóðum, sum í stødd minna um Føroyar, og sum Føroyar áður hava havt gott tak á.




*Liktenstein, sum Føroyar tríggjar ferðir hava vunnið ímóti, spældi fyri trimum árum síðani javnt móti Portugal*

*Mynd: Polfoto/AP*

Besta dømið um hetta er, hvussu tað gekk, tá ið Portugal og Liktinstein vóru í undankappingarbólki saman í 2004 og í 2005. Ta ferðina knógvaði Portugal á heimavølli akkurát Liktinstein 2-1, eftir at Liktinstein hevði verið frammanfyri 1-0 í hálvleikinum. Í Vaduz í Liktinstein hilnaðist tað uppaftur betri hjá heimaliðnum. Liktinstein megnaði 2-2 ímóti Portugal.

Føroyar og Liktinstein hava fleiri ferðir spælt vinardystir ímóti hvørjum øðrum. Higartil hava Føroyar havt takið á fúrstadøminum. Føroyar og Liktinstein hava tríggjar ferðir spælt ímóti hvørjum øðrum, og higartil hava Føroyar vunnið allar dystirnar. Samlaði málmunurin er 5-1.

Fyrsti dysturin var 26. apríl í 2000 í Vaduz. Ta ferðina vunnu Føroyar 1-0. Næsti dysturin var í Grikkalandi 13. Februar í 2002. Ta ferðina vunnu Føroyar aftur 1-0. Síðsti dysturin var á Tórsvølli 19. august í 2002. Ta ferðina vunnu Føroyar 3-1.

Eingin ivi er um, at FSF, venjarin, spælararnir og allur tann føroyski fótbóltsheimurin droymir um aftur at fáa møguleikan at spæla ímóti smáum europeiskum fótbóltstjóðum sum eitt nú Liktinstein, sum nú er styrkismett væl hægri á FIFA listanum, enn Føroyar eru. Sannlíkið fyri at Føroyar og Liktinstein skulu koma í undankappingarbólk saman er millum lítið og einki. FSF hevur roynt at dyrgt eftir vinardystum ímóti fótbóltstjóðum við somu styrki sum Føroyar ella har á leið, men tað hevur gingið striltið.

Hesa ferð løgdu Føroyar rygg til 5-0 tap ímóti Portugal, sum næstu ferð skal spæla undankappingardyst ímóti Malta. Tað hevði verið spennandi, um Føroyar høvdu fingið møguleikan at spæla ímóti Malta, Liktinstein ella kanska Luksemburg.